# Medaljutungir bogaskjúttar


*Rógvi Mohr*


*Schandorff Vang*


*Sigrid Kristianna Vang*


*Absalon Hansen*


*Annika Vang*


*Jóannes Poulsen*


*Jógvan Niclasen*


*Per Holm Andersen*


*Rakul Dam*

**Føroysku bogaskjúttarnir hava hvørja ferð havt okkur slag av málmi við í skjáttuni seinastu tíggju árini, og tí kunnu vit vænta, at bogaskjúttarnir aftur í ár gera sítt íkast til føroyska medaljubunkan**

BOGASKJÓTING
*Stefan í Skorini*

Ein ítróttargrein, ið vit føroyingar hava staðið okkum væl í seinastu nógvu árini, er bogaskjóting. Serliga eru tað hjúnini Sigrid og Schandorff Vang, ið hava gjørt okkurt gott hálið millum ár og dag.

- Vit hava góðar vónir um, at vit fáa okkurt heiðursmerki aftur í ár, sigur Schandorff Vang, ið hevur verið ein av oddamonnunum innan bogaskjóting í Føroyum.

Hann sigur, at úrslitini hava verið góð seinastu tíðina, men at veðrið hevur órógva fyrireikingarnar til tíðir. Tó hevur veðrið ikki darvað meira enn so, at fleiri av skjúttunum hava sett persónlig met í vár.

- Í compound eru vit eins væl fyri, og vit vóru fyri tveimum árum síðani, men í recurve hava vit fingið styrkt liðið, sigur Schandorff.

Í recurve fara vit at síggja Absalon Hansen, Rógva Mohr, Anniku Vang og Rakul Dam. Í compound verða Sigrid Vang, Schandorff Vang, Jógvan Niclasen, Per Holm Andersen og Jóannes Poulsen.

Munurin á recurve og compound er tann, at recurve er tann klassiski bogin, meðan compound bogin er meira nútímans útgerð - uttan at koma nærri munin á hesum báðum.

Hvør einstakur bogaskjútti hevur møguleika at vinna fýra medaljur - tvær í individuellari kapping og tvær í liðkapping.

## Absalon við aftur

Ein bogaskjútti, ið verður spennandi at fylgja, er Absalon Hansen. Hann fekk eina silvur í recurve í 1997, men hevur síðani havt ein steðg í skjótingini. Nú hevur hann so aftur tikið bogan í hond, og vónandi kann hann endurtaka úrslitið frá 1997.

Absalon Hansen eigur eisini eitt gullmerki frá Oyggjaleikunum, men tað var í eini aðrari ítróttargrein. Absalon framdi nevniliga tað bragd at vinna gull í marathon í 1989, tá leikirnir vóru í Føroyum.

Fyri tveimum árum síðani fingu vit bert medaljur í compound, tá Schandorff fekk bronsu og silvur í einstaklingakappingini, og fyri lið fingu vit silvur og gull.

Ein skjútti, ið møguliga kann gera seg galdandi í ár, er Annika Vang, dóttir Schandorff og Sigrid. Hon er so at siga uppvaksin við bogaskjóting, og pápin metir, at hon kann røkka langt, um hon er væl uppløgd, tá kappingin fer í gongd.

## Bogaskjóting væl umtókt

Schandorff Vang metir, at støðan í føroyskari bogaskjóting er á leið tann sama, sum hon hevur verið seinastu árini uttan tey stóru sveigini í áhuganum millum fólk.

Eitt nýtt felag er sett á stovn í Vágunum, men hetta felagið er bert fyri vaksin fyribils. Tey hava tó ætlanir um at byrja við børnum í framtíðini. Frammanundan eru feløg í Havn og í Runavík.

- Í Havn er pláss fyri 60 børnum hvønn vetur, og tað er fullteknað. Felagið kundi tikið 100 børn inn, um orka var til tess í felagnum, greiðir Schandorff Vang frá.

- Vit hava nakrar yngri skjúttar, sum kunnu røkka landsliðnum, men tað ræður um at halda teimum til, sigur Schandorff.



*Hóast unga aldurin er Annika Vang avgjørt ein av teimum, sum føroyingar vænta sær nógv av á leikunum*



VASTI 459010

– gagnnýtið elorkuna skynsamt!

SEV

TÍÐINDAVAKTIN
ALT VIKUSKIFTIÐ
Vikuskiftisvaktin hjá
SOSIALINUM & PORTALINUM
er at hitta alt vikuskiftið á
TELEFON 22 50 00
Ringið um tit hava søgur, hugskot og tips ella um tit vilja kunna um fundir, tiltøk, konsertir o.a., sum fer fram kring alt landið í vikuskiftinum

VIVA